átrúnaður

Lagt til rættis: Snorri Brend *snorri@sosialurin.fo*



orðið

## Succes fæst við samstarvi

**Men vit hildu áfram at byggja borgargarðin, til hann var allur komin upp í hálva hædd. Og fólkið starvaði við góðum huga. *(Nehemia 4,6)***

Tá Nehemia lýsir seg sjálvan, ger hann tað opið og erligt – um sorg sína um toftirnar í Jerúsalem; um bøn sína um vegleiðing og teir dagarnar, tá hann ivaðist í, um hann fór at yvirliva. Men tá tað snýr seg um tað ótrúliga avrikið at endurreisa múrarnar í Jerúsalem eftir bert 52 døgum, gevur hann øðrum heiðurin. »Vit endurreistu múrin, tí fólkið starvaðist av heilum hjarta«, soleiðis sum enska týðingin sigur. Tað eru eingi mørk fyri tí ein kann røkka, so leingin eingin berjist fyri at fáa heiðurin.

Tey seinnu árini hevur forsangarin í tónleikabólkinum U2, Bono víðkað virksemið til annað enn tónleikin og er vorðin ein týðandi forsprákari fyri teim hjálparleysu og kúgaðu. Áhugavert er eisini, at hann er Bíbliu-lesari, og hevur lært seg at samstarva við onnur, til tess at røkka endamáli sínum. Hann hevur tosað við statsleiðarar, fíggjarfólk, ídnaðarleiðarar, kend fólk – øll sum hava møguleika at hjálpa teimum menniskjunum, hann ynskir at røkka. Hvar lærdi Bono at vera bundin at øðrum; at vera ein partur av einum bólki og at taka ímóti hjálp frá øðrum? Rokk-stjørnur tykjast vera sjálvglað, isolerað og líkasæl um onnur. Tað er tí at so nógvir tónleikabólkar ikki kunnu halda saman.

Viðmerkingin hjá Bono er: »Tað eru tíðir, tá fólk eru so upptikin av sær sjálvum og krøvunum til tilveru teirra, at tað er trupult at vera í einum tónleikabólki. Fólk ynskja at vera harrar í teirra egna ríki. Eg haldi, at tá fólk gerast eldri, missa tey so líðandi evnini at broyta meining og at argumentera. Ein upplivir tað bæði í familjuni og millum vinir. Úrslitið er, at ein fær færri og færri menniskju rundan um seg, og sum tey eru samd við. Og soleiðis endar lívið í keðiligari líkasælu«.

Ynskir tú at uppliva succes, mást tú læra teg at samstarva.

*(Kelda: ucb.dk)*

# Sjómansheimið framvegis stongt



*Ivasamt er, um Sjómansheimið í Runavík letur upp aftur sum slíkt*

### Enn er eingi útlit fyri at Runavíkar Sjómansheim letur upp aftur

**Runavík**: Átta mánaðir eru nú farnir síðani Runavíkar Sjómansheim lat aftur.

Tað stongdi 1. september í fjør, men enn er ógreitt, hvussu framtíðin verður við heiminum.

Kristian Martin Petersen, formaður í stýrinum fyri sjómansheimið, sigur, at teir hava fingið fyrispurningar um at leiga heimið.

- Støða er kortini ikki tikin til hetta enn, men tað verður í næstum, sigur hann við mission.fo.

Um heimið ikki verður útleigað, verður tað helst lýst til sølu og selt, um nóg góður prísur fæst fyri tað.

Sjómansheimið í Runavík er knýtt arbeiðinum hjá Sjómansmissiónini, ið aftur er ein av arbeiðsgreinunum hjá Heimamissiónini.

**Seinasta: Letur upp 1. juni**
Hóast døpru útlitini er nú greitt, at Jaspur Langgaard av Nesi, fer at lata Runavíka Sjómansheim upp aftur 1. juni, skrivar Trúboðin sum kom út í dag.

# Nú eru bert átta heim eftir

**Tað er einki eindømi, at eitt føroyskt sjómansheim letur aftur. Hetta er sama gongdin, sum ein sær aftur innan hetta virksemið í Danmark**

Broytta arbeiðsmynstrið hjá dønum hevur aftur havt sær, at færri og færri sjómenn ferðast til danskar havnir.

Ringarnir av hesi minkingini hava eisini breitt seg til sjómansheimini, sum í síni tíð vóru 42 í tali.

Miðskeiðis í februar mánaði í ár vóru einans níggju eftir, og seinni sama mánaðin skuldi eitt teirra seljast aftrat. Hinvegin verður væntað, at hini fara at yvirliva sum sjómansheim við hotellvirksemi sínum.

Tinna Glisbo, sum saman við manninum eru fyristøðupar á Fredericia Sømandshjem klagar kortini ikki um raksturin.

Í Fredericia vitja dagliga eini 5-6 skip, og hevur sjómansheimið eini 30 vitjandi um dagin. Til døgurðan sunnudag eru tey ofta upp ímóti 100 gestum til borðs.

- Vit hava sjálvandi ein ávísan rætt. Men vit skulu eisini hava pening til tað sosiala virksemið. Hann fáa vit umvegis hotellvirksemið, sigur hon.

### Færri havnir – størri skip

Formaðurin fyri Skagen Sømanshjem, Per Rasmussen er ikki ímóti hugsanini at ein skal forvinna til raksturin við hotellvirksemi.

- Hetta er eitt sindur troyttandi, men hetta er tann veruleikin, sum vit standa í, sigur hann.

Per Rasmussen staðfestir, at samstundis sum talið av sjómansheimum fækkast, er ein partur av Danmarkarsøguni við at hvørva.

- Men tað er ein natúrligur útviklingur, nú tað bert eru 8 sjómansheim eftir. Veruleikin er, at havnirnar fækka og skipini gerast størri og størri.

- Hetta mugu sjómansheimini eisini skipa seg eftir, sigur hann.

### Ommu- og abbadagur

**Havn**: Nú sunnudagin kl. 14 verður ein heldur øðrvísi sunnudagsskúli í Meinigheitshúsinum í Havn. Tá verður nevniliga ein ommu- og abbadagur.
Til høvið kunnu børnini bjóða ommu síni og sínum abba við, ella onkrum sum tey eru góð við.
Við sunnudagsskúlanum fer ein abbi at hava tekstin og ein omma fer at fortelja eina søgu.
Eisini fer barnakórið í Sørvági at syngja. Aftaná verður ein drekkamunnur at fáa.
- Øll eru hjartaliga vælkomin at vera við, bæði børn, foreldur teirra og sjálvandi ommurnar og abbarnir, verður sagt úr sunnudagsskúlanum í Meinigheitshúsinum.

## Føroysk hvítusunna í Danmark

**Esbjerg**: Teir føroyingar, ið hava áhuga at luttaka við møtir í Danmark á hvítusunnu, fáa eitt gott høvi til hetta seinni í mánaðinum. Hesa høgtíðina skipar føroyski trúboðarin, Heri Elttør fyri møti í missiónshúsinum Bethania í Esbjerg. Møtini byrja fríggjakvøldið 9. mai og halda fram til sunnudagin. Høvuðstalari verður Thomas Dam, formaður í føroysku Heimamissiónini. Eitt líknandi tiltak varð royndt í fjør í Hirtshals við góðum úrsliti. Hetta vóru fólk so væl nøgd við, at avgjørt er at royna tað aftur í ár.

## Gerhard skrivar kirkjusøgu



**Prestar**: Í farnu viku kom út bókin »Rendsborg Danske Kirkes Historie«, sum presturin Gerhard Hansen hevur skrivað. Tann 262 síðu stóra bókin er um 40 ára tíðarskeiðið í hesi kirkjuni – frá 1946 til 1986. – Hetta er ein søga, sum sigur frá sterkum vilja, ósemjum, toli og kærleika at finna ein samleika í danska minnilutanum í Týsklandi eftir 2. heimsbardaga, verður sagt um hana. 64 ára gamli rithøvundurin, Gerhard Hansen var í tíðarskeiðinum 1981-87 prestur í Rendsborg og hevur frá 1987-92 í Vestmanna og Vágum. Bókin fæst í bókhandlum kring landið.

## Willow Creek-stevna í heyst

**Heimamissiónin**: Fyri tveimum árum síðani varð skipað fyri eini serstakari leiðarastevnu á Toftum. Henda var so mikið væleydnað, at ætlanin er at endurtaka stevnuna, tó við øðrvísi leisti. Hetta verður ein Willow Creek-stevna sum verður hildin saman við øðrum samkomum. Heitið á stevnuni er »Global Leadership Summit« og verður í Norðurlandahúsinum.
– Vit meta, at stevnan kann geva góðan íblástur í uppgávu okkara sum leiðarar í kristiliga arbeiðinum, sigur Thomas Dam, formaður í Heimamissiónini.

Sosialurin